## Harðskapur og innbrot í býnum

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnunáttina fekk politiið í Havn eina fráboðan um harðskap. Tað var ein, sum varð álopin niðri við Føroya Banka niðri í miðbýnum. Hetta málið verður nú kannað.

Somuleiðis sunnunáttina var eitt lítið innbrot í Gullhorninum. Onkur hevði brotið sýnisgluggan inn, og tikið tað, sum lá innanfyri.

Annars sigur politiið í Havn, at vikuskiftið hevur verið ógvuliga friðarligt. Onkur hevur verið inni og sovið rúsin av sær, og eisini hevur ferðmátingar verið gjørdar í Kollafirði, á Oyggjarvegnum og við Leynavatn. Her vórðu tveir tiknir fyri at koyra ov skjótt.

# Telefonónáðir

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Politiið í Runavík fekk um vikuskiftið tvær fráboðanir um telefonónáðir. Talan er um tvær kvinnur, sum hava boðað politinum frá.

– Sak verður ikki gjørt burturúr málinum, tí telefonónáðirnar hava ikki innihildið hóttanir, og tá hóttanir ikki eru, so verður ongin sak. Men sjálvt um man ikki hóttir, so kann man gott brúka grovt mál, og verða óbehagiligur, sigur vakthavandi á politistøðini í Runavík.

Í øðrum førinum hevur politiið funnið útav, hvør ringjarin var, og hevur politiið eisini havt samband við hann, har viðkomandi er biðin um at uppføra seg betri í telefonini.

Onnur kvinnan hevði nummarvísara, men av tí at nummarið var dult, so visti hon ikki, hvør hevði ringt.

Men politiið í Runavík sigur, at nógv minni av slíkum málum eru frammi, síðani fólk hava fingið sær nummarvísara.

# Tveir nýggir leiðarar innan løgregluna

**Tveir nýggir millumleiðarar eru settir í føroyska politistaliðnum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Settir eru tveir nýggir millumleiðarar í føroyska politistaliðnum. Tað eru politistarnir Kristjan Martin Joensen og Kristian Dahl. Teirra starvsheiti er nú varapolitikommiserar.

Kristjan Martin Joensen er 43 ára gamal. Hann byrjaði sum politistur í 1983, og starvaðist sum politistur í Danmark, til hann kom til Føroya í 1988. Seinastu tíðina hevur hann rókt starvið sum sýslumaður í Runavík. Hesum virksemi heldur hann fyribils fram við, sigur fútin í tíðindaskrivi.

Kristian Dahl er 37 ára gamal. Hann byrjaði sum politistur í 1988. Fyri tað mesta hevur hann starvast í Havn, undantikið eitt ár, har hann hevur verið politistur á Tvøroyri. Kristian Dahl skal fyribils røkja starvið sum vaktleiðari á politistøðini í Havn.

### Aðrar broytingar

Fyrrverandi sýslumaðurin, Kári Thorsteinsson, byrjar aftur í politinum tann 1. november í ár. Hann hevur eitt skifti verið í farloyvið, og haraftur at hevur hann virkað sum skrivari hjá Kommunuskipan Føroya.

Kári Thorsteinsson hevur havt ymisk leiðarastørv innan løgregluna. Seinast sum sýslumaður í Runavík frá 1993 – 2001. Nú hann byrjar aftur, verður tað sum dagligur leiðari á Avgreiðsludeildini á politistøðini í Havn. Hansara starvsheiti er nú politikommiserur.






# Stórur tørvur á arbeiðsfólki í Leirvík

**– Okkum tørvar 16 góðar reinskerarar, sigur virkisleiðarin á Tavuni, Kári Egholm Jacobsen.**

ARBEIÐI
*Vilmund Jacobsen*



*Í Leirvík er nógv fiskaarbeiði, og stórur tørvur er á arbeiðsmegi. Tí arbeiða bæði avbygdafólk og útlendingar eisini á fiskavirkjunum í Leirvík*

Í Leirvík er stórt framleiðsluvirksemi innan fiskivinnuna. Í bygdini eru ikki færri enn trý hampilig fiskavirkir umframt knettavirkið, sum er eitt minni arbeiðspláss.

Virkini, talan er um, eru Tavan, fiskavirkið hjá Kjartani Joensen og høvdavirkið.

Tað er greitt, at skulu øll hesi virki hava nóg mikið av arbeiðsfólki, er neyðugt, at fólk eisini koma úr øðrum bygdum til Leirvíkar at arbeiða. Men tað er ikki óavmarkað, hvussu nógv fólk eru tøk aðrastaðni, tí í flestu grannabygdum er eisini nógv at takast við.

Í Leirvík arbeiða tí eisini fleiri avbygdafólk og útlendingar, eitt nú póllakkar, jugoslavar og russar.

### Seks útlendingar

Kári Egholm Jacobsen, sum er virkisleiðari á Tavuni í Leirvík, sigur, at tey hava einar seks útlendingar á virkinum í løtuni.

– Millum hesar er onkur fótbóltsspælari við konu, og fyrr í heyst komu eisini tveir jugoslavar til arbeiðis á virkinum.

Hann sigur, at útlendingarnir fyri tað mesta arbeiða í summarhálvuni, fara heimaftur um heystarnar og koma síðan aftur, tá ið tað byrjar at vára.

– Men nú hava vit eisini bíðilista við útlendingum. Fólk, sum arbeiða her, hava samband við vinir og kenningar í heimlandinum, og har eru fólk, sum vilja sleppa heim til Føroya at arbeiða.

Kári sigur, at vanliga fáa hesi fólk eitt arbeiðsloyvi, sum varar í 3 mánaðir ella meira, og hetta loyvi kann so endurnýggjast. Skulu útlendingar koma higar at arbeiða, er neyðugt, at tey bæði hava játtan frá arbeiðsgevara uppá arbeiði og arbeiðsloyvi frá myndugleikunum.

### Tavuni vantar 16 reinskerarar

Nú gullaksavertíðin er liðug, arbeiða tey upsa á Tavuni. Tey arbeiða í tveimum vaktum við 30-35 fólkum á hvørji vakt. Fyrra vaktin er til arbeiðis frá kl. 8-16 og seinna frá kl. 16 til midnátt.

– Í løtuni vantar okkum 16 góðar reinskerarar. Vit hava søkt eftir fólki í bløðunum, men tað vísir seg ikki at nytta nakað, sigur virkisleiðarin.

Hann sigur, at fáast ikki fleiri reinskerarar, er ikki óhugsandi, at Tavan noyðist at gevast við aðrari vaktini.

Spurdur, hvussu útlendingarnir roynast, letur Kári Egholm Jacobsen, væl at.

– Tey roynast væl sum arbeiðsfólk, og fleiri teirra hava góðar útbúgvingar, sigur virkisleiðarin at enda.



# Nýggjur drápsháttur skal menna norsku alivinnuna

**Við at køla fiskin niður fyri slakt og harvið minka um strongdina, leingist tíðin, til deyðsstívleikin kemur í fiskin**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Verður laksurin niðurkøldur fyri slakt, gerst hann minni strongdur og stívnar seinni*

Ein nýggjur drápsháttur ger tað møguligt hjá norskari laksaframleiðslu at virka fiskin betur eftir, at hann er dripin. Hátturin ger, at laksurin kann útflytast "deyðsfeskur", sum norðmenn taka til og eisini víðari góðskaður við fyrimunum, sum alivinnan ikki hevur í dag.

Granskarin, Per Olav Skjervold, hevur arbeitt við spurninginum um feskleika í fleiri ár. Hann hevur skrivað og nú eisini vart doktararitgerð um evnið.

Skjervold heldur, at nýggi drápshátturin og fileteringshátturin kann vera við til at tvífalda vinningin í norskari alivinnu.

- Í dag verða bara 2% av fiskinum víðari góðskað útyvir tað at skera fiskin í tvey. At alifiskurin ikki verður meirvirkaður, kann fáa álvarsligar fylgjur fyri norsku alivinnuna, sigur Skjervold.

### Deyðsstívleikin

Nýggi hátturin snýr seg um at køla fiskin niður, meðan hann enn er livandi, soleiðis at hann ikki gerst strongdur fyri slakt. Á henda hátt tekur tað eisini longri tíð, til fiskurin stívnar, soleiðis at hann kann virkast. Vanligt er, at laksurin liggur í 2-6 dagar eftir slakt, áðrenn deyðsstívleikin (rigor mortis) fer úr fiskinum, soleiðis at framleiðslan kann byrja.

Við at køla fiskin niður fyri slakt og harvið minka um strongdina, leingist tíðin, til deyðsstívleikin kemur í fiskin. Hetta ger tað møguligt hjá ídnaðinum at flakaskera og beina burtur bein, áðrenn fiskurin gerst stívur og ringur at arbeiða við.

Á henda hátt hevur norski ídnaðurin longu eitt fleiri dagar langt "forspring" mótvegis øðrum kappingarneytum, tá ið ræður um feskleika og dygdir sum fastleika og reyða litin í laksinum.

### Eitt skump...

Drápshátturin við at køla fiskin niður fyri slakt, er høvuðsevnið í doktararitgerðini hjá Per Olav Skjervold, sum hann vardi á norska landbúnaðarháskúlanum síðst í september.

Higartil hevur norski ídnaðurin verið fyri atfinningum, tí laksurin verður útfluttur óvirkaður.

Kappingin úti á altjóða marknaðinum er hørð, men norðmenn meta, at granskingin hjá Per Olav Skjervold fer at geva laksaídnaðinum eitt rættiligt skump í rætta endan.

# Laksur inni á firðunum á Svalbard

SVALBARD
*Vilmund Jacobsen*

Fyrr í heyst fiskaðu nógv fólk laks á firðunum á Svalbard.

Sagt verður, at tað er heilt óvanligt at fáa laks um hesar leiðir. Men hitabroytingar í sjónum og havstreymar hava elvt til, at nógvur laksur hevur leitað sær norður til hesar fjarskotnu leiðir.

### Forboð

Stuttleikin hjá Svalbardsfólkunum vardi ikki leingi, tí meðan fiskiskapurin gekk uppá tað besta, setti sýslumaðurin á Svalbard forboð ímóti hesi veiði.

Tey einastu, sum kundu halda fram at fiska eftir forboðið, vóru tey, sum sýslumaðurin læt fáa eitt fyribils fiskiloyvi.

Hetta loyvi fingu ikki øll, skilst.

Avgjørt er, at laksurin, sum veiddur verður inni á firðunum á Svalbard, skal kannast.


